# Klokkan verið í familjuni í 117 ár

Klokkarayrkið hevur verið í familjuni hjá Niels Juel Arge í Klaksvík í 117 ár. Hetta er nakað, sum gamli klokkarin er errin av. Sum tað sær út nú, verður klokkan eisini verandi í familjuni í nøkur ár afturat. Niels Juel er farin frá fyri aldur, og tað er við gleði hann lítur aftur á lívið sum klokkari í Klaksvík



*Niels Juel Arge var klokkari í Christianskirkjuni í 44 ár. Hann er tann triði í familjuni, sum tók sær av klokkuni, og nú er tað versonurin, Hjørleif, sum hevur tikið yvir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Kristi Himmalferðaraftan fyri 65 árum síðani ringdi tann tá 15 ára gamli Niels Juel Arge fyri fyrstu ferð við klokkuni í kirkjuni í Klaksvík. Tað var ikki stásiliga Christianskirkjan, men gamla og vakra kirkjan, sum stóð á Ziskatrøð.

Pápi hansara var klokkari, og vanligt er, at halgan verður ringd inn kvøldið fyri. Kimað varð í eitt korter og síðani samanringing í trý korter. Brosandi minnist Niels Juel aftur á, at tað gekk akkurát hjá honum at ringja í eitt korter.

– Eg var so ungur tá, og tað var strævið at ringja við klokkuni, sigur hann.

Men eftir hetta var Niels Juel ofta og ringdi fyri pápa sín, og spakuliga vandi hann seg við tað.

– Tað var eitt ávíst stev, sum ein mátti læra seg. Sært tú, ta gomlu klokkuna nýttu vit enska ringing til. Tað vil siga, at hon sló fýra sløg, og tískil var gamla ringingin nakað heilt serligt. Ein mátti halda stevið, ella sló hon bara tvey ella trý sløg, greiðir gamli klokkarin frá.

Sjálvur heldur hann, at serliga kimingin ljóðaði nógv betur við tí gomlu klokkuni, sum eisini varð nýtt í Christianskirkjuni í 25 ár.

## Alt broyttist

Við tí nýggju klokkuni broyttist nógv. Farið varð burtur frá ensku ringingini og yvir til donsku ístaðin. Har er talan um eitt slag, og stevið eitt heilt annað. Men við tí nýggju klokkuni kom eisini tað tøkniliga, har onki stev var neyðugt, so longi sum tøknin virkaði, sum hon skuldi.

Frá at fara í kirkjuna tríggjar ferðir hvønn sunnumorgun at ringja inn, kundi Niels Juel bara stilla ta nýggju inn at ringja klokkan 9 og 10. So fór hann í kirkjuna sjálvur til gudstænastuna klokkan 11. Hetta gjørdi klokkarayrkið nógv minni bundisligt, sum hann sjálvur tekur til.

Niels Juel greiðir eisini frá, at fyrr var gamalt, at klokkarin ikki bara ringdi við klokkuni. Hann skuldi eisini grava kava. Við gomlu kirkju á Ziskatrøð skuldi kavin gravast burtur frá portrinum og til inngongdina til kirkjuna.

– Tað var nokk so langt strekki, sum skuldi gravast. Ein morgunin vakti pápi meg klokkan seks og bað meg koma upp at grava kava, sigur Niels Juel flennandi.

## Tænarasinn

Niels Juel hevur slitið mangt sporið eftir gólvinum í Christianskirkjuni. Hann varð alment innsettur sum klokkari Allahalgannadag í 1960. Pápin var tá deyður, men Niels Juel og mamman vóru samd um, at betur var um, pápin bleiv loystur úr klokkarastarvinum, áðrenn sonurin varð innsettur.

Klokkarin heldur fyri, at tá ein fer í slíkt starv, so má ein hava tænarasinn.

– Tú gert ikki av sjálvur, nær tú skalt til arbeiðis, vísir hann á.

Men hann leggur afturat, at hann ikki hevur verið einsamallur um klokkuna. Hann hevði fólk at hjálpa sær og loysa av.

Fyrst var tað bróðurin, Eilif, sum hjálpti honum, síðani ein annar maður, sum eitur Jóan Jakke.

– Sonurin, Andreas, plagdi eisini at hjálpa mær, men tað bar ikki so væl til hjá honum, tí hann siglir við Brimli. Men so hevur versonurin Hjørleif hjálpt til tey seinastu árini, og tað verður hann saman við øðrum, sum tekur yvir, sigur Niels Juel, sum viðgongur, at tað hevur nakað at siga, at familjan tekur yvir. Klokkan hevur verið í familjuni í 117 ár, so tað hevði uttan iva verið enn torførari fyri hann at givist, um tað ikki var ein í familjuni, sum tók yvir.

## Ongantíð seinur

Øll hesi 44 árini Niels Juel hevur verið klokkari, hevur hann ongantíð verið ov seinur at ringja inn. Sjálvt ikki tá summar og vetrartíðin skiftir.

Tað hava annars mangan verið søgur um, at fólk eru farin í kirkju og hava møtt kirkjuliðnum á veg útaftur, tí tey hava gloymt at flutt klokkuna.

Hetta váttar Niels Juel eisini.

– Jú, jú, tað er komið fyri, at vit hava møtt fólki, tá gudstænastan var av. Men sjálvur gloymdi eg tað kortini ongantíð, sigur hann og brosar.

Men so greiðir hann frá, at tað er komið fyri einaferð í hansara tíð sum klokkari, at hann gloymdi eina handling. Tað var ein mánadag í august. Tað skuldi vera barnadópur í kirkjuni, og Niels Juel hevði fingið boðini.

Hann rokaðist við at hoyggja og gloymdi púra dópin.

– Tí dámdi Bøgesvang at arga meg við. Tí allir hinir kirkjutænararnir høvdu gjørt eitthvørt, sum Henning kundi arga teir við. Men ikki eg. Inntil tann dagin. Tað var so eisini tann einasta kirkjuliga handlingin, sum eg gloymdi.

## Lívsins kvøld

Niels Juel er júst farin um tey áttati. Aldurin er farin at seta síni spor, men kortini er hann væl fyri.

Hann bleiv brádliga blindur av einum blóðtøppi í eyganum. Tá gjørdi hann av at siga klokkuna frá sær.

– Eg bleiv blindur nærum yvir nátt, og tá var tað sum, at alt steðgaði upp hjá mær. Nú er mest sum alt farið, haldi eg.

Tó situr hann ikki fyri onki. Hendan dagin, tá Sosialurin er á gátt, fæst hann við at knýta uppí.

– Aja, eg royni. Okkurt skal tíðin nýtast til, nú aldurin er vorðin so høgur, sigur Niels Juel Arge, gamli klokkarin í Klaksvík.

So leggur hann afturat, at hóast hann er givin sum klokkari, so fer hann kortini í kirkju hvønn sunnumorgun. So longi sum lív og heilsa er til tað.

Og meðan lívsins kvøld sígur oman yvir hann, kann hann við frøi síggja versonin í yrkinum sum klokkari. Hvussu mong ár hann fer at halda klokkuni í familjuni, kann bara tíðin vísa. Men har eru nógv abbabørn eisini, sum kanska einaferð fara at taka við.






## Bogi Andreasen • 31 ár • pedagogur

Lýs teg sjálvan við trimum orðum?
- Ehh... positivur og... engageraður... og... eh... kúllaligur!

Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?
- Áh galið ikki... Hvat eg sigi ofta? Jú, ein setningur, sum eg sigi ræðuliga oftani er : Tað laga' seg...

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
- Handan spurningin havi eg faktiskt hugsað eitt sindur um.. Faktiskt hyggi eg at heildini. Persónligheit, útstráling og sjálvalit hevur nógv at siga, haldi eg...

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?
- Einar 5-10 minuttir.

Hvat stressar teg?
- Fólk, sum eru óengagerað í sínum arbeiði. Tað stressar meg ræðuliga nógv at arbeiða saman við slíkum fólkum!!

Hvat gleðir teg?
- Ein góð gospelkonsert!

Nær feldi tú seinast eitt tár?
- Tað er eftirhondini langt síðani. Tað var 28 august 2001, tveir dagar eftir, at vit høvdu fingið at vita, at sonurin hevði downs syndrom. Tá loyvdi eg mær at reagera, og líkasum fáa tað út...

Nær smakkaði tú tær seinast á, ella vart í vertskapi?
- Tað hevur verið fyrst í august mánaða, tá eg át ein góðan døgverða saman við vinfólki, har vit drukku vín afturvið matinum.

Um tú vart landsstýrisfólk, hvat málsøkið vildi tú so umsitið?
- Avgjørt mentamál, tí tað er líkasum innanfyri mítt øki. Skúlamál og mentamál hava mína interessu.

Hvat er besta uppfinning? Hví?
- Teldan er tann besta. Hon fyllir nógv í mínum arbeiði, og í mínum samskiftið við onnur. Tú kanst eisini gera øgiliga nógv kreativ ting við telduni.

Nær flutti tú heimanífrá, saman við hvørjum?
- Eg flutti úr Klaksvík til Havnar, tá eg var 21 ára gamal. Tað var í lestarørindum.

Hvat kostar ein dunkur av vaseline hand&nail lotion, 200 ml?
- Ein dunkur av handkrem? Hann kostar ikki so nógv, eini... eini 16 kr. 16.95 giti eg...
Nei, í Miklagarði kostar ein tílíkur, ljósareyður dunkur av handkremi 39.95!

Í seinastuni hava fjølmiðlarnir verið á gosið um ein enskan fanga í Irak. Synirnir hava alment biðið bretska forsætisráðharran um hjálp. Men í farnu viku varð maðurin hóast alt avrættaður. Hvussu æt maðurin?
- Ja... ja... Havi hoyrt nógv um hatta, hatta hevur jú verið í øllum fjølmiðlunum. Men nei, eg komi ikki á navnið... Nei, eg minnist ikki!
Bretski fangin æt Ken Bigley!

Títt besta heimaráð?
- Jú, eg havi tann góða vana, at tá eg skifti lortablæður, so leggi eg tær ikki í skrellispannina inni, men fari út í skrellispannina uttan fyri við teimum beinanvegin. Annars fer tað at lukta nakað so illa inni... So tað kann eg anbefala øllum at gera, haha...

Hvør skal næstu ferð setast í bláa stólin?
- Jákup Jacobsen, byggifrøðingur, sum nú arbeiðir í Sparikassanum. Hann er eisini formaður í Kajakfelagnum. Eg haldi, at hann er ein ógvuliga spennandi persónur, sum eg gjarna hevði viljað sæð.